Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Liðugt viðgjørdir sjúklingar á sjúkrahúsunum

Spurningar:

1. Hvussu nógvir persónar liggja á føroyskum sjúkrahúsum, sum eru liðugt viðgjørdir, men sum kortini ikki verða útskrivaðir, tí teir hava ongastaðni at fara?
2. Er talið á liðugt viðgjørdum persónum í sjúkrahúsverkinum vaksandi?
3. Hvørja ávirkan hava hesir persónarnir á møguleikarnar hjá øðrum at sleppa framat viðgerð?
4. Hvør hevur ábyrgdina av hesum persónunum?
5. Hvat verður gjørt fyri at loysa henda trupulleikan?

Viðmerkingar:
Seinastu tíðina hevur ljóðað í fjølmiðlunum, at sjúklingar, sum eru liðugt viðgjørdir, verða liggjandi á sjúkrahúsunum, tí teir hava ongastaðni at fara. Sum skilst er talan um nógvar persónar, sum av eini ella aðrari orsøk koma í klemmu í skipanini.
Fyri at fáa málið lýst – og vónandi loyst, verður hesin spurningurin settur.

Á Løgtingi, 29. apríl 2024

Helgi Abrahamsen